Tryggingareftirlitið

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn 23. februar 2023
Journalnr.: 23/00065-3

Att. Anna Borg Dahl

Tykkara j.nr. 22/05679

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin) (Ígildissetan av 4. og 5. hvítvaskdirektivi o.a.)

Tryggingareftirlitið hevur hesar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin):

1. **§ 1, stk. 1, nr. 9**

Í § 1, stk. 1, nr. 9 í uppskotinum um útbjóðarar av spølum verður framd ein konsekvensbroyting. Viðmerkjast kann, at útbjóðarar av spølum eru fevndir av lógarøkinum í bæði hvítvasklógini og kongligu fyriskipanini. Mælt verður til at kanna hetta nærri.

2. **§ 28 a, stk. 2**

Í § 28 a, stk. 2 í uppskotinum er ein tøkniligur feilur.

3. **§ 29, stk. 3 og § 29 a**

Í m.a. § 29, stk. 3 og § 29 a í uppskotinum verða orðingarnar *skikkaður myndugleiki* og *málførur myndugleiki* nýtt fyri donsku orðingina *kompetent myndighed*. Mælt verður til at nýta somu orðing og gera møguligar konsekvensbroytingar í uppskotinum.

4. **§ 32 a**

Í § 32 a í uppskotinum verður mælt til at áseta eina nýggja áseting, ið gevur landsstýrismanninum heimild at tilnevna ein myndugleika at hava ábyrgd av at almannakunngera nøvnini á likamligum og løgfrøðiligum persónum, bólkum eindum, sum eru sett á lista hjá ST yvir revsitiltøk.

Av serligu viðmerkingunum til danska lógaruppskotið § 1, nr. 9 í 2019/1 LSF 58 skilst, at tað er Erhvervsstyrelsen, ið røkir hesa uppgávuna í Danmark.

Mælt verður til at nágreina serligu viðmerkingarnar til § 32 a í uppskotinum soleiðis, at tað skilst hvønn myndugleika, ið landsstýrismaðurin ætlar at tilnevna sambært ásetingini. Harumframt verður mælt til at lýsa nærri, hvussu skipanin við ST revsitiltøkum virkar ella fer at virka í Føroyum.

5. **§ 59 a**

Sambært § 59 a í uppskotinum fáa Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið heimild at geva fyrisitingarliga sekt. Í Danmark er tað bara Finanstilsynet, ið hevur heimild at geva fyrisitingarliga sekt, sbrt. § 78 a í donsku hvítvasklógini.

Í § 59 a, stk. 2 manglar Tryggingareftirlitið at verða nevnt í einum føri aftaná Skráseting Føroya.

6. Tøkniligir feilir í galdandi lóg og eftirlit við Realinum

At enda verður heitt á UVMR um at virka fyri, at áður nevndir tøkniligir feilir í § 36 og § 50 í hvítvasklógini verða rættaðir, eins og greiðari eftirlits- og gjaldsheimild viðvíkjandi Realinum verður fingin til vega.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein